# Fundarbók hjá Eysturkommunu
# 520 Leirvík

_________/_________ Síða

Jóhan Christiansen, borgarst./ Erik Lervig,skr.

**Býráðsfundur mánadagin 26. januar 2015 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen

**Fundurin lokin kl. 21.15**

**Fundarskrá:** / **Fundarsamtykt:**

1. **14/00512**
**Umsókn um stuðul – Reysti**
Svimjifelagið Reysti hevur sent kommununi umsókn um stuðul fyri 2015. Søkt verður um stuðul á 100.000,00 kr.

Mentanarnevndin mælir til at ganga umsóknini á møti og veita stuðul á 100.000,00 kr. og at peningurin verður tikin av konto 5.24.14.510-20 **(Stuðul til ítrótt)**

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

*Fundarsamtykt:* Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

2. **15/00030**
**Arbeiðssetningur til arbeiðið viðv. framtíðar skúlabygnaðin í Eysturkommunu**
Støðutakan til fyriliggjandi uppskot til arbeiðssetning.

Mentanarnevndin mælir til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til arbeiðssetning.

*Fundarsamtykt:* Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Hanna Jensen, Oluffa Joensen

**Atkvøður ímóti:**
Brandur Jacobsen við tí viðmerking at Eysturkommuna skal framhaldandi hava fokus á at loysa avbjóðingina við framhaldsdeildini.

3. **14/00575**
**Samanlegging av matr. 129 og matr. nr. 314 í Syðrugøtu**
Ánarnir av matr. nr 129 og 314 í Syðrugøtu hava sent Umhvørvisstovuni umsókn um samanlegging av matr. nr. 129 og 314 í Syðrugøtu, og hevur Umhvørvisstovan sent Eysturkommunu málið til ummælis.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at

*Fundarsamtykt:* Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðsfundur mánadagin 26. januar 2015 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen

**Fundurin lokin kl. 21.15**

viðmæla samanlegging av matr. nr. 129 og 314 í Syðrgøtu.

**4. 14/00576**

**Umsókn um keyp av lendi og viðmæli til sundurbýti matr. nr. 290a og 290b undir Gøtueiði**

Regin Joensen, undir Gøtueiði hevur sent umsókn um keyp av uml. 400 m$^2$ av Guttastovupartinum matr. nr. 290a og uml. 50 m$^2$ frá Eysturkommunu. Ætlanin við hesum keypi er, at umbyggja fjósið til sethús og at matrikulin verður á stødd við grundstykki.

Sambært galdandi Byggisamtykt er ásetingin fyri økið B, ið er bústaðarøki.

Málið fevnir um støðutakan at selja 50 m$^2$ frá 281a, sum er ogn hjá Eysturkommunu til Regin Joensen, og umv iðmæli til Búnaðarstovuna um sølu av jørð frá festinum Guttastovupartur.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at selja uml. 50 m$^2$ frá matr. nr. 281a hjá Eysturkommunu fyri 89,00 kr. per fermetur, og at viðmæla keypi av jørð frá Guttastovupartinum.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini, og fíggjarnevndini.

**5. 14/00297**

**Umsókn um ummæli at keypa fjós/seyðahús og lendi av matr. nr. 128a í Leirvík**

Málið er viðgjørt í Leirvíkar kommunu í 2008 og í Eysturkommunu í 2014. Samtyktin er send til Búnaðarstovuna, sum hevur tikið málið upp til nýggja viðgerð, og staðfest er at Umhvørvisstovan vil ikki frábýta verandi matr. nr. 128a Leirvíkar bygd við ástandandi fjósi, uttan so at allur matrikulin verður frábyttur festinum.

Eysturkommunu verður biðjin um at gera sítt viðmæli í sambandi við frábýti.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

*Hanna Jensen var uti undir viðgerðini vegna ógegni.*

**Býráðsfundur mánadagin 26. januar 2015 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen

**Fundurin lokin kl. 21.15**

Byggi- og býarskipanarnevndin hevur viðgjørt málið aftur á fundi tann 14. januar 2015 og mælir til at viðmæla, at festarin fær loyvi at keypa undirlendi matr. nr. 128a.

6. **14/00503**
**Umsókn um veg – Hebron í Leirvik**
Samkoman Hebron í Leirvík søkir um at fáa vegin matr. nr. P til keyps. Vegurin er umleið 197m$^2$ og er ímillum Hebron og jørðina omanfyri vegin sum Hebron hevur ogna sær.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at umsóknin verður viðgjørd tá ið útstykking fyri Fløtugerði verður gjørd.

Málið tikið av skrá.

7. **15/00013**
**Hoyring av lógaruppskotum um løgtingsvallóg og kommunuvallóg**
Kommununar hava fingið lógaruppskot um løgtingsvallóg og kommunuvallóg til hoyringar, í hoyringsskrivinum frá almannaráðnum verður sagt:

*"Skotið verður upp at minsta stødd av valstaði verður hækkað til 100 veljarar, í dag kann spurnartekin setast við um grundleggjandi rætturin til at atkvøða loyniligt, er tryggjaður í galdandi vallógum.*

*Skotið verður eisini upp at víðka rættin at greiða brævatkvøðu, soleiðis at ein og hvør sum ynskir at greiða brævatkvøðu kann gera tað, uttan mun til um tað ber til at møta á valstaðnum valdagin ella ikki. Skotið verður eisini upp at brævatkvøður telja við, um tær eru komnar á valstaðið áðrenn atkvøðugreiðslan er endað.*

*Galdandi løgtings- og kommunuvallógir hava sera ymiskan bygnað, sum ger tær sera tungar at umsita. Endamálið við lógaruppskotunum er fyrst og fremst at dagføra lógirnar, soleiðis at*

Eysturkommuna hevur ongar viðmerkingar.

# Fundarbók hjá Eysturkommunu 520 Leirvík



**Býráðsfundur mánadagin 26. januar 2015 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen

**Fundurin lokin kl. 21.15**

*tær bygnaðarliga líkjast meiri hvørji aðrari og verða lættari at skilja og umsita. Samstundis verða fleiri av ásetingunum í lógunum dagførdar og tillagaðar – bæði málsliga, innihaldsliga og tøkniliga."*

**8. 15/00000**

**Roknskapur fyri bókasøvnini**
Góðkenning av roknskapinum fyri 2014 fyri Leirvíkar - og Gøtu bókasavn.

Einmælt samtykt at góðkenna fyriliggjandi roknskap.

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________

Hanna Jensen ______________________

Hanus Jacobsen ______________________

Hjalti Dalheim ______________________

Árni Jacobsen ______________________

Oluffa Joensen ______________________

Brandur Jacobsen ______________________

Emma Rasmussen ______________________

Ólavur Olsen ______________________